## Norröna bar við molan

**Norröna tók í molan hósdagin í síðstu viku, tá hon fekk eina hvirlu í útsynninginum. Óhappið hevði einki upp á seg, sigur skiparin og fær stuðul frá Havnarskrivstovuni**

ÓHAPP
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Skiparin kann hava eina trupla uppgávu, tá vindur er, og Norröna skal leggjast at bryggjuni í Havn. Serliga tá útsynningur er.

Sjón fekst fyri søgn hósdagin í síðstu viku, at atløguviðurskiftini kundu verið betri. Tá skiparin stýrdi Norrönu inneftir, sást á øllum brøgdum, at hann var eyka varligur. Kortini var endin, at Norröna bar við molan, tá hon skuldi leggja at.

Skiparin Ólavur Hovsgarð váttar sjálvur, at Norröna tók í, men tað var heldur ikki meira.

– Tað var útsynningur og nógvur vindur, og tá er ikki lætt at leggja at. Meðan vit sigla innímóti, fáa vit eina hvirlu, og so bar skipið við molan. Norröna fekk eina lítla buklu har afturi í stýriborðsíðuni, men annars hevði tað einki upp á seg, sigur Ólavur Hovsgarð.

Buklan er kosmetisk. Hon er ein góðan metur long og 10 sentimetrar djúp. Fólkini umborð merktu einki til lítla samanstoytin við molan.

Sambært vakthavandi á Havnaskrivstovuni hevði óhappið lítið upp á seg, og er ikki annað enn tað, sum kann henda, tá stór skip leggja at. Annars gongur væl at leggja Norrönu at, verður sagt, og skiparin hevur fingið góðar royndir.

Skiparin vísir á, at har er einki at geva av, tá hann skal leggja Norrönu at. Verður nakað gjørt galið, so tekur Norröna í. Tíbetur spældi væl av hesaferð.

# Ferðafrásøgn úr New York

**Umframt at røkja fundarvirksemi, hevur høvi eisini verið at sæð og upplivað ymist í New York – líka frá blómandi mentanarlívi yvir øðrvísi kirkjugongd til ymsar útferðir**

*Heðin Mortensen*
*løgtingslimur*

Hesar fyrstu tvær vikurnar í New York hava gingið skjótt, men væl er komið burturúr. Sera áhugaverdir og vælfyrireikaðir fundir hava verið hvønn dag.

Týdningurin av trygdaráðnum í ST hevur verið á skránni nakrar ferðir. Noreg er limur har, og og var norskur souschefur ein fyrrapart og greiddi frá, hvat Noreg hevur fingið burturúr. Hetta hevur sjálvandi stóran áhuga, nú Danmark hevur lagt umsókn inn um at gerast limur í trygdarráðnum.

Síðani hava vit eisini fingið nógv at vita um fíggjarætlanir og fíggjarstøðuna hjá ST, mannarættindi og framtíðarmálsetningar. Greitt er eisini frá konfliktum, sum eitt nú konsulátini arbeiða við hvønn dag kring allan heim.

Men sjálvt um ein er í politiskum ørindum her yviri, hevur tíð eisini verið til at vitja kend støð og uppliva býnum. Danska Konsulátið skipaði fyri einum túri til Chelsea og tveimum túrum til Harlem.

### Blómandi mentan

Tað er soleiðis, at mentanin blómar í New York. Her eru 2.176 mentanarhús, og her búgva umleið 80.000 amerikansk og útlendsk listarfólk. 35 milliónir ferðafólk vitja býin um árið, og her er nokk at fara til, tí tað eru í meðal ikki færri 525 ymisk listarlig tiltøk um dagin.

Býarpartin Chelsea liggur út til Hudson-ánna. Har var fyrr sera stórt havnarvirksemi við vøruflutningi til og úr New York. Hetta virksemi er nú flutt aðrastaðni, so nógvir tómir bygningar eru í umráðnum. Í dag húsa nakrir av hesum bygningum eini 160 gallaríum. Hetta eru gallaríir, sum seinnu árini eru flutt út úr kenda listarliga býarpartinum Soho, tí húsaleigan har gjørdist so dýr.

Í Chelsea hava tey í staðin keypt hesar stóru, gomlu goymslubygningarnar og innrættað teir til gallaríir. Bygningarnir eru so stórir, at tað vóru 20 ymisk gallarí í tí eina bygninginum, vit vóru í. Vit vitjaðu átta av teimum 160 gallaríunum. Øll sera ymisk og prísstøðið hareftir. Tilsamans eru eini 500 gallarí í New York.

### Rættur jazzur

Sum nevnt varð eisini skipað fyri tveimum túrum í Harlem, sum er býarparturin norðan fyri á Manhattan, har mest litt fólk búgva. Har er sera fátæksligt, men kortini kenst framburður í Harlem nú.

Har vóru vit eitt kvøldið, Harlem by Night, og vitjaðu trý ymisk støð. Tað fyrsta var ein nýggj matstova, har vit eisini fingu okkum ein bita. Síðani varð farið á eitt stað við nýggjum jazz-tónleiki, og endað var á einum gomlum jazzklubba, Showman,s, frá 1942.

Har var góður stemningur, og sera hugnaligt at síggja og hoyra rættan jazztónleik. Nógv fólk var har tað kvøldið, eitt nú fleiri eldri fólk, sum høvdu spælt og sungið har sum yngri.

### Øðrvísi kirkjugongd

Sunnudagin varð farið í kirkju í Harlem, Caanan Baptist Church. Tað var eitt upplivilsi, sum vardi í tríggjar tímar, men teir gingu skjótt. Kirkjan var stúgvandi full og eitt gospelkór, sum taldi 60 fólk, syrgdi fyri at sangurin rungaði eftirí.

Nógvar kunngerðir vóru um mangt og hvat, og fyriuttan prestin høvdu fleiri onnur lovorð og sang at bera fram. Eisini varð sungið fyri teimum, sum høvdu føðingardag í oktober, og vórðu hesi biðin um at reisa seg upp.

Talvan gekk tvær ferðir, og at enda fór alt kirkjufólkið til altars, men ikki soleiðis, sum vit kenna tað úr Føroyum. Her komu kirkjutænarar runt við føtum við altarbreyði og smáum gløsum við altarvíni. Bíðað var til øll høvdu fingið, so var koyrt í munnin.

Jú, ein sera øðrvísi og lívlig kirkjugongd, má sigast. Aftaná var farið á matstovu at eta soulmat, sum eru rættir eftir originalum uppskriftum úr Suðurstatunum.


*Eftir kirkjugongdina varð farið á matstovu at eta soulmat, sum eru rættir eftir originalum uppskriftum úr Suðurstatunum*

### Gott tol krevst

Annars hava vit bæði Hjørdis og sonurin Eirikur, sum hevur verið við okkum í 12 dagar, verið nógva staðni sjálv. Eitt nú uppi í Empire State Building, sum nú aftur er størsti bygningur í New York.

Tað tók bert eitt gott ár at byggja bygningin, sum stóð liðugur í 1930.

Heilt fantastiskt var tað at standa 86 hæddir uppi og hyggja út yvir býin.

Men her krevst gott tol, tí tað tók okkum tríggjar tímar at sleppa upp í tornið. Har er eitt øgiligt fólk, sum vitjar hvønn dag.

Ein annan dagin fóru vit við ferju, fyrst til Liberty Island og síðani Ellis

Island. Á Liberty gingu vit í ein góðan tíma. Síðan 11. september 2001 hevur ikki borið til at fara inn í standmyndina, so har varð gingið uttanum.

Útsýnið higani yvir á meginlandið er sera flott.

### Søgulig fótafet

Á Ellis Island vóru vit í stívliga tveir tímar, og har er eisini nógv at síggja. Eitt nú er tann størsti bygningurin har gjørdur um til søguligt savn. Tað kendist heilt løgið at standa á staðnum, har innflytarar úr Europa og aðrastaðni frá komu við skipi, og settu fótin á land í USA.

Øll hesi vóru full av vónum um eitt betri lív, men soleiðis gjørdist ikki hjá øllum. Tey skuldu gjøgnum strangt heilsueftirlit, og vóru tey, sum høvdu sjúklig brek, send heimaftur.

Frá 1892 til 1924 komu samanlagt 12 milliónir fólk til USA umvegis Ellis Island, onkran dag komu heili 5.000 fólk í land har.

Tað var sera áhugavert at ganga runt og hyggja at gomlum myndum og lutum, og greið frágreiðing var til alt.

### Føroyingur uppkallaður

Vit høvdu eisini gjørt av at koyra til býarpartin Bronx, sum sigst at vera uppkallaður eftir føroyingi, ið fór yvir til USA fyri nógvum árum síðani.

Hetta hevði áhuga fyri okkum, sum búgva við Jónas Broncksgøtu í Havn.

Í hondbók um New York stendur at lesa, at føroyingurin Jónas Bronck kom yvir higar í 1639 saman við hollendingum. Í 1641 keypti hann fitt av jørð frá indianarum í býti við eitt nú nakrar vatnketlar. Tað skuldu tó ganga 200 ár, áðrenn fyrstu rættiligu bygdirnar komu har á staðnum.

Vit sóu onga standmynd av manninum, men eitt universitet er uppkallað eftir honum. Í dag er Bronx best kent fyri sítt heimskenda Yankee-Stadium, sum hevur pláss fyri 57.500 baseball-áskoðarum. Henda dagin, vit vitjaðu har, var eingin dystur, men vit hava sæð dystir í sjónvarpinum, meðan vit hava verið her – og tá kókar alt.

Í Bronx finst eisini størsti djóragarðurin í USA.

### Pípur í hópatali

Eitt kvøldið vóru vit og ótu á eini góðari, gamlari matstovu, Keen's Steakhouse, sum læt upp í 1885. Matstovan er kend fyri at hava 90.000 pípur hangandi uppi undir loftinum. Hetta eru pípur, sum newyorkarar upp ígjøgnum árini hava átt og roykt úr har á matstovuni, eftir at hava etið ein betri bita. Millum aðrar var pípan hjá Franklin D. Roosewelt at síggja har.

### Døgurði hjá ambassadørinum

Danski ambassadørurin Ellen Margrethe Løj bjóðaði øllum luttakarunum við maka heim til sín til døgurða eitt kvøldið. Har vóru eisini onnur úr ambassaduni, so vit vóru 25 íalt. Tað var eitt sera hugnaligt kvøld, og var maturin framúr góður. Ellen Margrethe Løj, sum er sera fryntlig, hevur áður verið ambassadørur í Ísrael. Hon býr í stórari íbúð, sum danski staturin eigur, í vøkrum umhvørvi á 5th Av. vid Central Park sum granna.

Soleiðis kundi verið hildið fram við at sagt frá, tí nógv annað hevur verið á skránni. Vit hava eisini verið stak heppin við veðrinum, tí sól og turt hevur verið so gott sum hvønn dag, og hitin hevur ligið um 15 stig.

Vit skulu vera í New York í eina viku aftrat, og mánadagin 13. oktober gongur leiðin so við bussi til Washington DC. Har verður eisini nógv forvitnisligt at vitja, eitt nú Kongressin, Pentagon og Heimsbankin, so enn eiga vit nakrar spennandi upplivingar á.



# Vil ikki verða hongdur út sum ein hálvkriminellur lúshundur

**Skiparin á Arvtic Viking skammast ikki yvir at hann hevur fingið vinningsbýti, beint eftir at skipið fekk almenna sanering. Men hann viðgongur kortini, at tað var óheppið**

ARCTIC VIKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit hava onki at skammast yvir.

Fyri fyrstu ferð loysir ein av teimum, sum eigur umstrídda rækjutrolaran, Arctic Viking, frá posabandinum, eftir avdúkingarnar seinastu dagarnar.

Bjarni Petersen, skipari á Arctic Viking og ein av teimum sjey eigarunum heldur, at tað er nógv fyri at verða úthongdur sum ein hálvkriminellur lúshundur, tí at eigararnir hava útgoldið sær sjálvum vinningsbýti.


*– Eg havi ikk ringa samvitsku fyri tað, sum vit fingu vinningsbýti, hóast tað almenna hevði saneráð okkum beint frammanundan, sigur skiparin á Arctic Viking, Bjarni Petersen, sum eisini er ein av eigarunum*

### Ómoralskt

Víst hevur verið á í Degi og Viku, Útvarpinum og kanska øðrum fjølmiðlum við, at ætlanin er at fáa Arctic Viking undir estlendskt flagg, hóast báturin fekk almenna sanering fyri fýra, fimm árum síðani, júst fyri at varðveita teir í føroyska flotanum. Fer skipið undir Estlendskt flagg, fer tað at bera til at fáa bíligari manning umborð.

Samstundis hevur verið víst á, at árið eftir, teir fingu hesa almennu saneringina, rindaðu teir sjey eigararnir sær 2,4 milliónir í vinningsbýti.

Hetta hevur elvt til nógv kjak og er eisini tikið upp á politiskum stigi. Tað eru kreftir í Løgtinginum, sum vilja hava samgonguna at viðgera málið og enntá hevur tað verið nevnt at Løgtingið skal nokta eigarunum at fáa bátin undir Estlendskt flagg. Og fleiri ferðir hevur orðið ómoralskt, verðið heft á teir, sum eiga Arctic Viking fyri at teir tóru sær sjálvum vinningsbýti árið eftir at teir fingu almenna sanering.

### Ein desperat roynd at yvirliva

Skiparin á Arctic Viking dugir ikki at síggja, hví hetta skal verða blivið ein gøla.

Hann sigur, at hann hevur onki at skammast yvir og hann hevur ikki ringa samvitsku.

Men hann viðgongur kortini, at skal hann vera eftirsnarur, var tað óheppið at eigararnir fingu sær sjálvum vinningsbýti.

Hann sigur, at ætlanin at fara undir Estlendskt flagg er ein desperat roynd at yvirliva.

Hann leggur samstundis dent á, at tað verður bara eitt styttri tíðarskeið, at Arctic Viking, verður undir fremmandum flaggi.

Hann sigur, at tá ið eigararnir fingu sær vinningsbýti árið eftir saneringina, var tað tí, at Arctic Viking hevði havt eitt gott ár, har hann avreiddi fyri 48 milliónir.

– Samstundir vóru útlitini ikki so galin. Prísurin var á einari leið og oljan kostaði 75 oyru liturin.

Hann sigur, at teir á Arctic viking vóru ikki einsamallir um at síggja ljóst upp á framtíðina í 1998 og 1999.

– Hetta tíðarskeiðið komu tríggir rækutrolarir í flotan og samstundis keypti eitt professionelt felag sum Føroya Fiskasøla, 23% av felag okkara fyri 7-8 milliónir. So tað vóru mong, sum hildu at framtíðarútlitini vóru bjørt um hetta mundi, sigur Bjarni Petersen.

Men at prísirnir so fóru í botn og oljan trýfaldaðist í prísi, vóru vit ikki harrar yvir, sigur Bjarni Petersen.

Hann sigur, at sæð í bakspegilin, hevði tað verið skilabetri at latið vinningsbýtið uppá 2,4 milliónir verðið verandi í felagnum at styrkt tað.

Hann skilir eisini á ein hátt tey, sum halda, at tað var eitt sindur ómoralskt at taka vinningsbýtið árið eftir, at felagið er sanerað.

Men hann vísir samstundis á, at hetta var fyrstu ferð í 10 ár, at eigararnir fingu vinningsbýti yvirhøvur.

– Og so er veruleikin eisini tann, at av teimum 2,4 milliónunum, vit fingu tilsamans, settu vit eina millión í aftur felagið fyri at økja partapeningin.

Skiparin sigur, at tað er ringt at meta um framtíðina.

– Nógv betalti alivinnan í vinningsbýti fyri tveimum árum síðani. Og hvar ar alivinnan í dag, spyr hann. Tað er so lætt at vera eftirsnarur, leggur hann afturat, hóast hann eisini ásannar, at alivinnan ikki fekk sanering tá. Men hetta er eitt dømi um, hvussu trupult tað er at meta um framtíðina.

### Kundu havt bjarga okkum sjálvum

Bjarni Petersen hevur als ikki hug til at verða stemplaður sum ein, ið bara hevur misbrúkt almennar skattakrónur fyri egnan vinning.

– Vóru vit bara úti eftir at ríka okkum sjálvar upp, høvdu vit tikið av einum tilboði í fjør uppá at selja Arctic Viking fyri 55 milliónir, tí tá høvdu vit eitt ítøkiligt boð upp á hann.

– Men tað gjørdu vit ikki av berari tjóðskaparkenslu, tí vit vildu hava skipið á føroyskum hondum.

– Vit kundu eisini tikið av einum tilboði um at flutt yvir til Kanada seinast í áttatiárunum. So vóru allir fíggjarligar trupulleikar loystir. Tað gjørdu vit heldur ikki. Ístaðin fyri fór ein danskur rækjutrolari yvir. Í dag eiga teir tríggjar trolarar, sum hvør er tvær ferðir so stórur sum Arctic Viking.

Skiparin sigur, at teir hava ikki tikið av teimum møguleikum, sum hava verið fyri at ríka seg sjálvar upp, tí teir vildu varðveita arbeiðsplássið á føroyskum hondum.

### Sekstan trolarar farnir

Hann vísir eisini á, at teir hava alla tíðina lagt stóra orku í at hava raksturin so bíligan sum gjørligt.

–Vit eru sjey eigarar. Ein er reiðari, hinir seks sigla við. Hvørja ferð, vit eru í landi, gera vit eitt stórt arbeiðið fyri felagið, fyri at halda útreiðslunum niðri. Og tað er ólønt arbeiðið. Eitt nú gera vit nógv arbeiði sjálvir fyri onga løn, sum onnur reiðarí fáa onnur virki at gera fyri seg. Eitt nú gera vit nógv trol sjálvir. Hann heldur tí, at vinningsbýtið kann metast sum løn fyri tað ólønta arbeiðið, sum er gjørt ímeðan eigararnir hava verið í landi.

Bjarni Petersen sigur, at tað er orsøkin til at Arctic Viking yvihøvur enn er í flotanum.

– Síðani Arctic Viking kom í 1986, eru minst 16 rækjutrolarar farnir á húsagang ella seldir, áðrenn teir fóru undir hamaran. Tí haldi eg ikki, at tað skal leggjast okkum til last, at vit í eini desperatari roynd at yvirliva, fara undir fremmant flagg í eina tíð, tí vit hava gjørt tað, vit kundu, fyri at halda útreiðslunum niðri.

Hann vísir eisini, á, at tað var ikki bara Arctic Viking, sum fekk almenna sanering.

– Tað var ein skipan, sum kom í gildi fyri allar bátarnar og har hingu vit so uppi í. Fleiri aðrir bátar fingu nógv meiri sanering, enn vit fingu. Nógvir fingu alt sítt landskassavehald sanerað, men vit fingu bara ein part.

### Betalt aftur nógvar ferðir

Skiparin á Arctic Viking vísir eisini á tann týdning, skipið hevur havt fyri føroyska samfelagið

– Vit hava goldið ca 230 mill út til lønir í Føroyum, harav er ca helvtin farin í skatt og rest í umfar í føroyska samfelagnum.

Samstundis keyptu vit kvotur í fjør fyri fýra milliónir, samstundis sum aðrir skipabólkar, sum svimja í pengum, fáa sínar kvotur fyri at kalla onki frá landinum, eisini teir, sum fiska á fjarleiðum, tí afturfyri at teir fáa kvotur aðrastaðni, mugu vit lata onnur skip fáa kvotur frá okkum.

– Sostatt er alt tað, sum rækjuflotin fiskar fyri, rein inntøka hjá samfelagnum, samstundis og sostatt er okkara sanering fleiri ferðir afturgoldin sigur Bjarni Petersen.


*Arctic Viking hevur goldið 230 milliónir í lønum. Vit keyptu kvotur í fjør fyri fýra milliónir, hóast øll onnur skip fáa næstan alla sína kvotu fyri onki frá landinum. Vit kundu saktans havt ríkað okkum upp, men tað gjørdu vit ikki av berari tjóðskaparkenslu og tí at vit vildu varðveita arbeiðsplássið, sigur skiparin á Arctic Viking*